## Jústinus takkar fyri seg

Ein av eldsálunum í hondbóltsfelagnum StÍF, Jústinus Justinussen, hevur seinastu árini staðið á odda fyri besta kvinnuliðnum hjá felagnum. Jústinus hevur alla tíðina lagt seg eftir at spæla ungu leikararnar hjá felagnum inn á besta liðið, og hetta hevur eydnast sera væl hjá StÍF, sum at kalla bert hevur verið mannað av leikarum úr felagnum. Nú hevur Jústinus tó valt at takka fyri seg hjá besta kvinnuliðnum, og tí verður hann ikki venjari komandi kappingarár. Í staðin verður tað Jóhan Danielsen, sum í nógv ár stóð í málinum hjá bæði StÍF og Kyndli, sum fer at venja kvinnurnar hjá StÍF.



## Eingin Adela

Eitt av sterkastu vápnunum hjá besta kvinnuliðnum hjá StÍF seinasta árini hevur verið rumenski málmaðurin, Adela Burcea. Hon hevur í fleiri dystum staðið fram úr væl hjá StÍF, men komandi kappingarár verður eingin Adela í málinum. Adela er farin at spæla við Tjaldrið, og í staðin fyri hana hevur StÍF fingið tveir ungar málmenn úr Danmark. Talan er um Eline Larsen og Line Pluzek, sum sostatt skulu kappast um plássið í málinum.

## Jóhan skal standa á odda

**Jóhan Danielsen er nýggjur venjari hjá besta kvinnuliðnum hjá StÍF, og hann sigur seg vera ógvuliga spentan til nýggju uppgávuna sum venjari**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Seinastu árini hevur tað verið Jústinus Justinussen, sum hevur staðið á odda fyri besta kvinnuliðnum hjá StÍF, men nú tá hann hevur takkað fyri seg, er tað ein nýggjur maður, sum skal standa við róðri. Talan er um Jóhan Danielsen, sum helst man vera mest kendur fyri at hava vart málið hjá bæði StÍF og Kyndli.

Nýggi venjarin sigur seg vera ógvuliga spentan til uppgávuna sum venjari.

- Ja, hetta verður ógvuliga spennandi. Eg føldi meg nokk so ferdigan sum spælara, og tí haldi eg tað vera sera spennandi at fara undir eina slíka uppgávu.

Jóhan ætlar eisini at gera sítt til fyri at styrkja um liðið hjá strandakvinnum.

- Eg ætli mær at royna at útvikla liðið so væl, eg klári. Hetta er eitt spennandi lið við nógvum góðum, ungum leikarum, og eg fari at gera mítt besta fyri at fáa sum mest burtur úr liðnum, staðfestir nýggi venjarin at enda.

# Skjóta spælið er styrkin

**Stórt sæð somu spælarar vera við hjá strandakvinnunum í ár í mun til í fjør, har einasta broytingin tykist vera í málinum. Ársins spælari síðsta kappingarár, Ninna K. Johansen, sigur, at skjóta spælið er styrkin hjá liðnum**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Seinastu nógvu árini hava kvinnurnar hjá StÍF verið partur av bestu kvinnudeildini. Hesi árini hava tær ongantíð ligið heilt uppi í oddinum, men um vit sammeta StÍF við hini liðini, so hava tær heldur ikki havt nakran útlending á liðnum síðstu árini, um vit síggja burtur frá sterka málmanninum Adelu Burcea.

Í staðin fyri at satsa stórt upp á útlendskar leikarar hevur StÍF heldur valt at geva egnum leikarum møguleikan, og hetta hevur riggað heilt væl. Umframt Adelu var liðið seinasta kappingarár nevniliga bert mannað av ungum leikarum, sum eru uppvaksnir í felagnum.

Fleiri av hesum blaðungu leikarum megnaðu eisini at útmerka seg ímillum sterkar útlendskar leikarar í landinum síðsta kappingarár, meðan liðið eisini fekk fleiri góð og óvæntað úrslit ígjøgnum árið. Leggjast kann afturat, at bert 18 ára gamla Ninna. K. Johansen hjá StÍF gjørdist ársins leikari í Sunset-kappingini síðsta kappingarár.

Sosialurin hevur tikið eitt prát við júst Ninnu um kappingarárið, sum liggur fyri framman.



*- Skjóta spælið er styrkin hjá okkum, og hetta mugu vit fáa at rigga. Vit hava fleiri skjótar spælarar á liðnum, men vit mugu tó eisini hava yvirblikkið í ordan, tá vit spæla skjótt, so vit ikki gera ov nógvar feilir, heldur Ninna K. Johansen.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Fótbólturin hevur ávirkað fyrireikingarnar

Ninna K. Johansen sigur, at liðið er klárt at byrja Sunset-kappingina leygardagin, men hon leggur tó afturat, at fótbólturin hevur forstýra eitt sindur í uppstartinum.

- Vit hava havt eitt sindur av trupulleikum, tí at fótbólturin hevur forstýra okkara uppstart í hondbóltinum. Vit hava fleiri spælarar, sum eisini spæla fótbólt, og tí hava vit ikki verið so nógvar og vant. Men nú fótbólturin er liðugur, er tað blivið nógv betri, og eg haldi, at vit eru klárar at fara undir kappingina.

Ninna fortelur víðari, at ætlanin hjá StÍF fyrst og fremst er at arbeiða hart við liðnum og at hava tað stuttligt á vøllinum.

- Vit seta okkum ikki nakað beinleiðis mál undan kappingarbyrjan, men taka tað, sum tað kemur. Vit ætla at hugna okkum og hava tað stuttligt á vøllinum, og so mugu vit bara royna at arbeiða hart við liðnum og royna at gera tað so gott, sum til ber, staðfestir Ninna K. Johansen.

### Skjóta spælið er styrkin

Sjálvt um fótbólturin hevur ávirkað fyrireikingarnar nakað, so er hópurin hjá StÍF tó at kalla tann sami, sum síðsta kappingarár. Onkrar broytingar eru tó, sigur Ninna.

- Ja, vit hava mist Adelu í málinum. Hon er farin til Tjaldur at spæla hondbólt, men vit hava fingið tveir málmenn úr Danmark í staðin. Tær eru báðar ungar og passa væl inn í hópin, og tær skulu so eisini kappast um plássið í málinum.

Ninna heldur eisini, at um StÍF skal fáa góð úrslit komandi kappingarár, so mugu tær fáa skjóta spælið at rigga.

- Skjóta spælið er styrkin hjá okkum, og hetta mugu vit fáa at rigga. Vit hava fleiri skjótar spælarar á liðnum, men vit mugu tó eisini hava yvirblikkið í ordan, tá vit spæla skjótt, so vit ikki gera ov nógvar feilir, heldur Ninna.

### Stjørnan og Neistin vera sterkar

Tá vit at enda spurdu Ninnu, hvørji lið hon metti at vera tey sterkastu, var hon greið á málinum.

- Bæði Stjørnan og Neistin tykjast vera rættiliga sterkartil komandi kappingarár, og tað vera helst eisini hesi bæði, sum fara at kappast í oddinum. VB hevur eisini verið væl við síðstu árini, men eg trúgvi ikki, at VB verður eins væl fyri í ár. Vónandi fara vit eisini at liggja í oddinum, men eg vænti, at tað vera Stjørnan og Neistin, sum kappast um gull og silvur, og so mugu hini liðini berjast um restina, sigur Ninna K. Johansen at enda.

Hvussu verður og ikki hjá strandakvinnum ber enn bert til at gita um, men eingin ivi er um, at StÍF hevur gjørt eitt sera gott arbeiða við ungu spælarunum hjá felagnum. Fleiri teljast ímillum bestu føroysku spælarar yvirhøvur, og um spælararnir fáa teirra egna spæl at koyra, so er ikki óhugsandi, at StÍF kann fáa fleiri góð úrslit ígjøgnum árið.